

## Varpa ljós á Arktis

Tá tann næsta ST-veðurlagsráðstevnan verður í Keypmannahavn næsta heyst, eiga fyrireikararnir at varpa ljós á tey serligu viðurskiftini í tí arktiska økinum. Tað heldur í hvussu er næstformaðurin í Norðurlandaráðnum, svenska Christina Gestrin, sum saman við øðrum politikarum hevur verið á einari ráðstevnu í Alaska. Hon heldur, at politikararnir í Norðurlondum hava skyldu til at gera vart við tey serligu viðurskiftini í tí arktiska økinum, nú ísurin minkar.

# Nú má røkka ella støkka

**Eftir enn eina væleydnaða Ovastevnu sigur formaðurin, Jákup av Skarði, at tíðin nú er komin til, at ein støða má takast til svimjihyl í Nólsoy**

OVASTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað ber enn ikki til at siga, hvussu nógv fólk vóru úti í Nólsoy á Ovastevnu. Men mett verður, at talið var væl omanfyri 4.000.

Jákup av Skarði, formaður í Stuðulsnevndini fyri svimjihyl í Nólsoy, er ógvuliga væl nøgdur við talið á fólkið, sum hava vitjað.

Eg havi ikki tað nágreiniliga talið av fólki, sum eru komin um fjørðin, men tað hava nógv fólk vitjað í Nólsoy á stevnuni, sigur Jákup av Skarði.

Hóast tað ikki lá í kortunum, at so nógv skuldi gerast burtur úr tiltøkum til børnini, so var í síðstu løtu skipað fyri bæði hoppiborgum, trampolinum tombola og øðrum. Hartil vóru bæði pylsuvognarn og pannukøkur at fáa til keyps. Og so kundu nólsoyingar fyri fyrstu ferð keypa nýbakaða pizza í Nólsoy.

Fríggjakvøldið vóru tað fyri tað mesta tey ungu, sum valdu at leggja leiðina út um fjørð. Men tað vóru kortini ikki so mong á vitjan, sum vónað varð, serliga tí ferðaætlanin var so góð.

Men leygardagurin er altíð tann stóri stevnudagurin, og tað var hann eisini á Ovastevnu. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við lógarmálum, setti stevnuna klokkan tvey á keiøkinum, og fyri fyrstu ferð spældi Havnar Hornorkestur til setanina. So nógv fólk skuldu til Nólsoyar um ta tíðina, at Ritan mátti sigla áðrenn tíðina og gera eykatúr, fyri at øll skuldu sleppa við.

### Fótbóltur og svimjing

Tað var lagt upp til tað heilt stóra brakið, tá fótbóltsdysturin millum yngru og eldru tónleikararnar var spældur á Ovastevnu í dag.

Fitt av fólki hevði eisini leitað sær eystur á Mýrar, har kunstgrasvøllurin í Nólsoy liggur. Eftir ein rættiliga spennandi og javnan fyrra hálvleik var støðan 3-2 til teir yngru.

Teir komu á odda 1-0, men tað eydnaðist teimum eldru at javna. Síðani kom yngra liðið fram um 3-1, áðrenn teir »gomlu« minkaðu um munin til hálvleiksstøðuna.

Í seinna hálvleki var tó einki at gera. Teir yngr skoraðu fýra mál, uttan at tað eydnaðist teimum eldru at svara aftur, og sostatt endaði dysturin 7-2 til teir yngru. Sanniliga ein revansja, sum vil nakað.

Hvørt liðið valdi »man of the match« á mótstøðuliðnum, sum hvør fekk sítt steyp til ognar. Hjá teimum yngru varð Flóðin Viderø valdur og hjá teimum eldru Jens Marni Hansen.

Tá Ovastevnan fór inn í sítt fimta ár, vendi Erlendur Simonsen sær til Stuðulsnevndina fyri svimjihyl í Nólsoy at vita, um nevndin hevði áhuga í, at hann skipaði fyri svimjing um Nólsoyarfjørð í sambandi við Ovastevnuna.

Nevndin tók fegin undir við hesum tiltakinum, og tað hepnaðist so væl, at tað nú fyri 11. ferð varð svomið um Nólsoyarfjørð.

